## DAGSINS MEINING

# Tingsins tign í vanda

Tað var ikki hissini orðadrátt, Føroya fólk vóru vitni til á tingi mikudagin, tá tingfólk umrøddu skúladepilin í Marknagili í Havn. Tað eru ávísir tingmenn, sum ikki duga sær hógv, men hendan dagin fór Tórbjørn Jacobsen aftur langt út um mark, tá hann púra óátalaður trein upp á tingsins røðarapall og mælti til, at ein annar tingmaður skuldi innleggjast á psykiatrisku deild.

Vit hava havt nakrar tingmenn, sum fram um aðrar hava dugað illa at uppføra seg. Fyrr plagdu teir at siga, at »hatta er bara Óli« - tann tíð, tá Óli Breckmann skikkaði sær illa og hevði sum høvuðsmál at irritera fólk. Nú hevur Tjóðveldisflokkurin við Tórbjørni Jacobsen tikið yvir hendan leiklutin - sum meira má metast sum sjónleikur enn seriøst tingarbeiði.

Tað undrar eisini, at tingformaðurin letur slíkt um seg ganga - tað tænir ikki tignini. Tað er hann, sum hevur ábrygdina av, at orðaskiftið er á rímiligum støði, og átti hann ikki at loyvt slíkum orðadrátti.

Íslandssáttmálin hevur eisini fylt nógv seinastu tíðina. Ilt er hjá vanligum fólki at skilja, hvat er rætt og hvat er skeivt, men skjótt er at gjøgnumskoða, at her eru menn, ið vilja leggja øðrum fótonglar. Høvuðsleikarar í hesum máli eru løgtingsformaðurin og Johan Dahl. Báðir hava teir eitt horn í síðuni á løgmanni. Tað er nærliggjandi at hugsa sær, at teir vilja vinna løgmanni neisur. Hetta líkist alt ov nógv einum politiskum glantrileiki. Fyri Tjóðveldisflokkin sum størsta andstøðuflokk er hetta sjálvsagt funnin fressur, tí soleiðis er politikkur - serliga í Føroyum.

Men áhugavert hevði kortini verið at fingið uppspurt, hvussu nógv eitt slíkt rumbulsmál kostar umsitingini, sum í vikur og mánaðir hevur havt úr at gera við at kanna og granska og at keypa sær løgfrøðiligar niðurstøður fyri nógvar pengar.

Spurningurin er so, um talan er um vánaligt fyrireikingararbeiði í Tinganesi - ella einans um primitivan politiskan glantrileik, ið so avgjørt setir tingsins tign í vanda!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Smáir skógvar

**HERGEIR NIELSEN**
løgtingsmaður



Fyri meira enn einum ári síðan fekk samgongan umsókn frá kommununum í Suðuroynni um at vera við í einari felags menningarætlan fyri oynna.

Einki svar kom aftur og einki spurdist burturúr.

Samgongan var komin við eini Suðuroyarætlan, har tað varð ásannað, at støðan í oynni var vorðin so mikið hættislig, at politisk stig máttu takast til tess at stuðla eini tilgongd, ið hevði støðug arbeiðspláss við sær.

Í løgmansrøðuni hálvt ár seinni sást einki stig vera tikið.

Kommunurnar tóku hinvegin eitt stig, og sendu landsstýrinum umsókn um at vera við.

Eitt heilt álmanakkaár seinni var framvegis einki svar komið frá landsins stýri.

Tjóðveldisflokkurin legði tí málið á tingborð 2. mars í ár.

Málið fór í fíggjarnevndina, har samgongan súltaði tað.

Tá málið endiliga kom útaftur, mæltu tey frá at játta hesar neyðars 250.000 kr.

Grannvaksin fólk fóru í teir heilt smáu skógvarnar, og mæltu heldur til at játta somu upphædd til sama uppskot, sum teirra egna stýrið hevði skriva av eftir okkara og lagt fram ein mánaða seinni.

Andstøðan í fíggjarnevndini legði tíbetur lítið í hetta smásinnið, og mælti til at samtykkja uppskot okkara í fyrsta umfari og avskrivaða uppskotið frá samgonguni í øðrum umfari.

Harafturat tók andstøðan heilt og fult undir við stavnhaldinum um, at Suðuroyarøkið aftur skal gerast:

- ein áhugaverdur búsetingarvalkostur til høvuðsstaðarøkið,
- íbúgvatalið skal fáast at vaksa aftur,
- kappingarførið skal betrast,
- vøkstur skal fáast aftur í búskapin,
- arbeiðsmegin skal mennast,
- virki og størv í kappingargreinum skal økjast,
- dentur skal leggjast á altjóða verkætlanir,
- útlendskar íløgur og vitan skulu fáast til økið.

Vit leggja stóran dent á, at tað almenna stuðlar hesum átaki, og vit leggja minni, fyri ikki at siga einki í, hvør ið eigur uppskotið, ið vinnur frama.

Stigtakarar til hesa ætlan vóru teir báðir, Jógvan Mørkøre og Magni Laksafoss.

Hugskotið og fíggingarmynstrið kemur úr Eyafjarðarætlanini í Íslandi, har landið rindar góða helvt, meðan kommunusamtøk, vinnusamtøk og onnur lata rest.

Vit hildu ætlanina vera er so mikið áhugaverda, at tað var synd at hon doyði stráðdeyðan.

Vit fegnast tí sjálvandi um, at tað loksins eyðnaðist okkum at trýsta samgonguna til arbeiðis.

Vit eru sera takksom fyri, at ætlanin er komin undir land og ynskja stigtakarunum og kommununum í Suðuroynni góða eyðnu við henni.

Og sjálvandi taka vit tað sum eina sjálvfylgju, at samgongan játtar og fullførir samstarvsavtaluna, tá ið tað fyrireikandi arbeiði í hesi játtanini er liðugt.

# Miðflokkurin landsfund í Klaksvík

**Kom til Klaksvíkar og uppliva Norðoyggjar, nýggja undirsjóvartunnilin (enntá ókeypis) – og ársins landsfund 6. mai 2006**

Nú Norðoyartunnilin letur upp 29. apríl 2006, byrjar ein nýggjur kapitul í føroyskari søgu, og hetta vilja vit í Miðflokkinum eisini markera við at halda ársins landsfund í Klaksvík.

Tingmanning og flokksstjórn Miðfloksins býður øllum Miðflokkaáhugaðum ( limi ella ikki) vælkomnum á landsfund floksins, leygardagin 6. mai 2006, kl. 10.00 á Klaksvíkar sjómansheimi. Flokkurin bjóðar morgunmat fra kl. 09.00 og felagsmáltíð kl. 13.00. Miðað verður eftir, at fundurin er liðugur í seinasta lagi kl. 18.00





*Ása Olsen, fakfelagsleiðari og Petur Jacobsen, stjóri á Rás 2 verða gestarøðarar á landsfundinum hjá Miðflokkinum*

**Fundarskrá:**

- Fundurin verður settur av formanninum
- Val av fundarstjóra og fundarskrivara
- Frágreiðing frá farna ári (politisk og felagslig)
- Framløga og viðgerð av innkomnum málum
- Val av floksstjórnarlimum
- STEÐGUR 13.00-14.00
- Gestarøðarar
- Kjak - kaffi
- Framhald av kjaki
- floksyvirlýsing

Gestarøðarar verða: Ása Olsen, fakfelagsleiðari og Petur Jacobsen, stjóri á Rás2.

Ger leygardagin 6. mai til ein serligan dag. Kom til landsfund Miðfloksins og royn samstundis nýggja undirsjóvartunnilin og uppliva vøkru náttúruna í Norðoyggjum.

Øll eru vælkomin – royn og fá onnur við!

**Floksstjórnin**

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni. Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðsl-an ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.